LØGMÁLARÁÐIÐ

Ministry of Justice

# ÁRSFRÁGREIÐING UM EFTIRKANNING

LØGTINGSÁRIÐ 2022

29. juli 2022 – 28. juli 2023

# Formæli

Við gildi frá løgtingsárinum 2014 skulu øll uppskot frá landsfyrisitingini eftirkannast, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið ella kunngjørd. Eftirkanningin fer fram eftir ásetingunum í rundskrivi um eftirkanning og rundskrivi um lógarsmíð. Tað er lógartænastan í Løgmálaráðnum, sum hevur ábyrgdina av eftirkanningunum.

Rundskriv um eftirkanning ásetir, at uppskot til løgtingslóg, ríkislógartilmæli, samtyktar, kunngerð, rundskriv, leiðbeining, bekendtgørelse, lovbekendtgørelse og anordningsbekendtgørelse skulu eftirkannast. Tað er ásett, hvat eftirkanningin fevnir um, mannagongdir og tíðarfreistir í samband við innlating av uppskotum og eisini, hvat lógartænastan ikki eftirkannar.

Lógartænastan eftirkannar uppskot tøkniliga og løgfrøðiliga, men ikki málfrøðiliga. Umsitingin í Løgtinginum eftirkannar uppskot eisini málfrøðiliga. Tað er tí ábyrgdin hjá tí einstaka stjórnarráðnum at ansa eftir, at uppskot til lógir og kunngerðir eru málsliga lýtaleys.

Lógartænastan skal hava minst 5 yrkadagar at eftirkanna eitt uppskot. Hetta eiga stjórnarráðini at hava í huga, tá tey gera tíðarætlan fyri síni uppskot. Í hesum sambandi fara vit á minna á, at uppskotini skulu sendast til eftirkanningar, áðrenn tey verða send til politiskan landsstýrisfund, men aftan á at tey hava verið til ummælis.

Hetta er níggjunda ársfrágreiðingin, sum verður givin út. Endamálið við útgávuni er framvegis at kunna stjórnarráðini um ymiskt viðvíkjandi lógarsmíði og at siga frá okkara royndum seinasta løgtingárið, og hvussu hetta eftirkanningarárið eftir okkara tykki hevur hepnast.

Eisini er ein partur um ummælistíðir hjá stjórnarráðunum, viðgerðina í Løgtinginum og yvirlit yvir rættarreglur, sum eru kunngjørdar í Kunngerðablaðnum.

Løgtingsárið 2022 hevur sum heild verið merkt av, at vit hava havt eitt løgtingsval, og at eitt nýtt landsstýri tók við í desember 2022. Yvirskipað kann løgtingsárið 2022 sostatt býtast sundur í tvær ymiskar setur, og hetta setur sín dám á ársfrágreiðingina í ár. Fyrru setuna eftirkannaði lógartænastan 66 uppskot, seinnu setuna 150 uppskot. Av teimum 216 uppskotunum tilsamans, vórðu 205 uppskot ella 95% eftirkannað innan 5 yrkadagar, meðan 213 uppskot ella 99% vórðu eftirkannað innan 8 yrkadagar.

Gongdin í løgtingárinum 2022 hevur sum heild verið sera jalig, við tað at bert 15% av uppskotunum hjá øllum stjórnarráðunum vórðu send til ummælis við styttri enn 14 daga freist, ímóti 34% av uppskotunum í løgtingsárinum 2021. Heili 72% av uppskotunum vórðu send til ummælis í 4 vikur ella longri.

Løgmálaráðið heldur hetta er ein sera jalig gongd, og vónar, at hendan gongdin heldur áfram til frama fyri bæði lógardygd og demokratisku tilgongdina.

Løgmálaráðið, 29. mai 2024

**Nella Festirstein**
Aðalstjóri

# Innihaldsyvirlit

1. Yvirskipað yvirlit yvir broytingar í málsøkjabýtum og samanseting av stjórnarráðum .......... 4
1.1 Løgmansskrivstovan .......... 4
1.2 Fíggjarmálaráðið .......... 4
1.3 Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið .......... 4
1.4 Heilsumálaráðið .......... 5
1.5 Uttanríkis- og vinnumálaráðið .......... 5
1.6 Almanna- og mentamálaráðið .......... 6
1.7 Barna- og útbúgvingarmálaráðið .......... 6
1.8 Umhvørvismálaráðið .......... 6
1.9 Løgmálaráðið .......... 7
2. Løgfrøðiliga eftirkanningin .......... 9
2.1. Ásetingar um løgfrøðiligu eftirkanningina .......... 9
2.2 Ásetingar um eftirkanning av ríkislóggávu .......... 10
3. Tøkniliga eftirkanningin .......... 12
3.1. Ásetingar um tøkniligu eftirkanningina .......... 12
3.2. Tá broytt verður í einum eftirkannaðum uppskoti .......... 12
3.3. Uppskot sum er burturfallið í tinginum og verður sett fram aftur .......... 12
3.4. Skabelónir .......... 13
4. Yvirlit yvir eftirkanningar .......... 14
4.1. Uppskot, ið skulu eftirkannast av lógartænastuni .......... 14
4.2. Yvirlit yvir uppskotini .......... 15
4.3. Hvat siga tølini? .......... 23
4.4. Longd á eftirkanning .......... 26
5. Eftirkannað uppskot og viðgerðin í Løgtinginum .......... 29
6. Ummælisportalurin .......... 32
6.1. Einans uppskot sum eru løgd á ummælisportalin .......... 32
6.2. Ummælisfreistir .......... 32
6.3. Samanumtøka um ummælisfreistir .......... 34
6.4. Ov nógv uppskot verða ikki løgd á ummælisportalin .......... 34
7. Kunngerðablaðið .......... 37
7.1. Kunngering í tingárinum 2022 .......... 37

# 1. Yvirskipað yvirlit yvir broytingar í málsøkjabýtum og samanseting av stjórnarráðum

Eftir løgtingsvalið 8. desember 2022, fór talið á ráðum úr 7 upp í 9 ráð. Samstundis komu nýggj ráð og nýggjar samansetingar av ráðum. Hetta hevði við sær, at nógv málsøki vórðu flutt. Av hesi orsøk er trupult at gera samanberingar millum tingárini 2021 og 2022.

Niðanfyri er ein frágreiðing um, hvussu málsøki vórðu flutt, og hvussu nýggju aðalráðini yvirskipað síggja út nú. Ætlanin er at geva eitt yvirskipað yvirlit, so farið verður ikki niður í smálutir.

## 1.1 Løgmansskrivstovan

Lógartænastan flutti úr Løgmansskrivstovuni og eitt nýtt Løgmálaráð varð stovna. Tá ið lógartænastan varð flutt til nýggja Løgmálaráðið, vórðu hesi øki samstundis flutt úr Løgmansskrivstovuni:

- Revsirætturin
- Rættargangur
- Fyrisitingarrættur
- Dátuverndarrættur
- Vápnalóggáva
- Fíggjarrættur
- Kunngerðing og lógardygd

Løgmansskrivstovan hevur harafturímóti fingið allar undirsjóvartunnlarnar, fleiri partafeløg og eigarapolitikkin.

## 1.2 Fíggjarmálaráðið

Eftir valið flutti samferðslumál úr Fíggjarmálaráðnum og til Fiskimálaráðið. Samstundis vóru fleiri partafeløg løgd til løgmann at umsita, og barsilslóggáva varð flutt til Umhvørvismálaráðið.

## 1.3 Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Fiskivinnumálaráðið bleiv eftir valið í desember 2022 víðkað við samferðslumálum, umframt fastar ognir hjá landinum, sum ikki liggja hjá øðrum lansstýrismanni. Samstundis varð tilbúgving flutt til Løgmálaráðið.

## 1.4 Heilsumálaráðið

Heilsumálaráðið er nærum óbroytt, tó er Gigni flutt til Barna- og undirvísingarmálaráðið og norðurlandamál til Løgmálaráðið.

## 1.5 Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Vinnumál lógu áðrenn valið saman við umhvørvismálum. Eftir valið eru umhvørvismál og arbeiðsmarknaðarmál flutt til nýggja Umhvørvismálaráðið. Uttanríkismál eru síðan komin afturat vinnumálum.

Fleiri mál vóru flutt úr Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, í samband við at nýtt Umhvørvismáláráð og Løgmáláráð vóru stovnaði.

Mál eru eisini flutt úr Uttanríkismálaráðnum.

*Umhvørvismálaráðið:*

- Arbeiðsmarknaðarmál
- Brunaeftirlitið
- Byggimál
- Elveitingarmál
- Jarðfrøðis- og kolvetnismál
- Kort- og landmátingarmyndugleiki, matrikulering o.a.
- Náttúru- og umhvørvismál
- Orkumál
- Tryggingarmál
- Veðurlagsmál

*Løgmálaráðið*:

- Integratión
- Útlendingarættur
- Navnalóggáva
- Fólkayvirlit
- Kommunumál
- Altjóða menningarsamstarv
- Neyðhjálp
- Útoyggjamenning

## 1.6 Almanna- og mentamálaráðið

Almannamál lógu áðrenn valið fyri seg sjálvi, meðan mentamál lógu saman við uttanríkismálum. Eftir valið eru almannamál og mentamál løgd saman.

Í samband við at nýtt Barna- og útbúgvingarmálaráð, Løgmálaráð og Umhvørvismálaráð eru stovnaði eru fleiri mál flutt úr bæði almannamálum og mentamálum.

*Barna- og útbúgvningarmálaráðið:*

- Dagstovnar
- Fólkaskúlamál
- Vinnu- og miðnámsskúlamál
- Vísinda- og granskingarmál
- Serforsorgarmál viðvíkjandi børnum og ungum
- Barnavernd

*Løgmálaráðið*

- Persóns, húsfólka- og arvarættur
- Tvingsil á sosialaøkinum

*Umhvørvismálaráðið*

- Bústaðarmál

## 1.7 Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Barna- og útbúgvingarmálaráðið er nýtt ráð, sum hevur fingið øki frá Mentamálaráðnum, Almannamálaráðnum og Heilsumálaráðnum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið umsitir hesi øki:

- Dagstovnar
- Fólkaskúlamál
- Vinnu- og miðnámsskúlamál
- Vísinda- og granskingarmál
- Serforsorgarmál viðvíkjandi børnum og ungum
- Barnavernd
- Gigni

## 1.8 Umhvørvismálaráðið

Umhvørvismálaráðið er nýtt ráð, sum hevur fingið øki frá Vinnumálaráðnum, Almannamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum.

Umhvørvismálaráðið umsitir hesi øki:

- Arbeiðsmarknaðarmál
- Arbeiðsumhvørvismál
- Barsilsskipan
- Brunaumsjón
- Bústaðarmál
- Byggimál
- Elveitingarmál
- Kavaramál
- Kort- og landmátingarmyndygleika
- Lendisskipan
- Matrikulering og sundurbýti
- Náttúrumál
- Orkumál
- Skógarmál
- Tinglýsing
- Umhvørvismál
- Útskifting
- Vanlukkutryggingarmál
- Veðurlagsmál

## 1.9 Løgmálaráðið

Løgmálaráðið er nýtt ráð, sum hevur fingið øki frá Løgmansskrivstovuni, Vinnumálaráðnum, Uttanríkismálaráðnum, Almannamálaráðnum, Mentamálaráðnum, Fiskimálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum.

Løgmálaráðið umsitir hesi øki:

- Revsirættur
- Rættargangur
- Fyrisitingarrættur
- Dátuverndarrættur
- Vápnalóggáva
- Fíggjarrættur
- Kunngerðing og lógardygd
- Integratiónamál
- Útlendingarættur
- Kommunumál
- Kærumál
- Persóns-, húsfólka- og arvarættur
- Tilbúgving

- Tvingsil á sosialaøkinum
- Fólkayvirlit
- Navnamál
- Val
- Altjóða menningarsamstarv
- Neyðhjálp
- Útoyggjamenningarmál
- Norðurlandamál
- 5 partafeløg (Ítróttavedding, Atlantic Airways, Føroya Tele, Vága Floghavn, Postverk Føroya)

## 2. Løgfrøðiliga eftirkanningin

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

3.1. Lógartænastan í Løgmáláráðnum eftirkannar øll lógaruppskot, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Eftirkannað uppskot, ið eru fallin fyri freist Løgtingsins og verða løgd fram aftur, skulu eftirkannast aftur, um tey verða løgd fyri Løgtingið aftur. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.

3.2. Lógartænastan eftirkannar øll uppskot til kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini øll uppskot til kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at kunngera kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna. Lógartænastan skal eisini eftirkanna uppskot til bekendtgørelse, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse, sum ríkismyndugleikarnir senda til ummælis hjá stjórnarráðunum.

Okkara royndir eru, at stjórnarráðini í stóran mun taka undir við viðmerkingunum, sum tey fáa til eftirkanningina. Um ráðið heldur, at okkurt er ógreitt, ella tey ikki eru samd við metingina hjá lógartænastuni, samskifta vit við ráðið um hetta, og sum oftast koma vit til eina felags fatan.

### 2.1. Ásetingar um løgfrøðiligu eftirkanningina

7.2. Løgtingslógir: Lógartænastan eftirkannar fyrst og fremst, um løgtingslógaruppskot er í samsvari við grundlóg, heimastýrislóg, stýrisskipanarlóg, tingskipan, tvørgangandi lógir, eitt nú evropeiska mannarættindasáttmálan EMRS, revsilóg, fyrisitingarlóg, løgtingslóg um alment innlit og løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, almennar rættargrundreglur og almenn rættarprinsipp.

7.3. Harumframt verður serliga hugt at heimildarásetingum til fyrisitingina, afturvirkandi virknað, pantireglum, fyrisitingarligum sektaruppskotum, heimild at áseta gjald, eftirlitsásetingum, afturtøka av løggilding, revsireglum, gildiskomureglum, skiftisreglum, kærureglum o.tíl.

7.4. Lógartænastan eftirkannar, at løgtingslógaruppskotið er greitt og skilligt fyri bæði løgtingsmenn og borgaran, at sundurbýti í lógargreinar, stykkir, kapitlar, yvirskriftir o.tíl. er hóskandi, og at bæði tær almennu og serligu viðmerkingarnar til uppskotið samsvara við sjálvan lógartekstin.

7.6. Kunngerðir: Formligu krøvini til kunngerðir eru sum ásett í rundskrivi um lógarsmíð. Lógartænastan kannar fyrst og fremst, um neyðug heimild má metast at vera fyri kunngerðini. Hvat viðvíkur innihaldinum í eftirkanningini annars verður víst til brotini um eftirkanning av løgtingslógaruppskotum.

## 2.2 Ásetingar um eftirkanning av ríkislóggávu

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 7.7. Ríkislógartilmæli: Formligu krøvini til ríkislógartilmæli eru sambært § 45 í tingskipanini tey somu sum til løgtingslógaruppskot sambært § 37, og sum ásett í rundskrivi um lógarsmíð. Eftirkanningin fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um løgtingslógaruppskot, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama. Hetta er grundað á, at ríkislógartilmæli grundleggjandi víkja frá løgtingslógaruppskotum, tí talan er um lógartekst, sum longu er galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.
>
> 7.8. Bekendtgørelser, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse: Sambært stýrisskipanarlógini § 48 er tað avvarðandi landsstýrismaður, sum ummælir uppskot til kunngerðir, sum ráðharri sendir landsstýrinum við atliti at seta í gildi fyri Føroyar. Eftirkanningin av hesum fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um uppskot til kunngerðir, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama, tí talan er ofta um kunngerðir, sum longu eru galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.
>
> 7.9. Við eftirkanningini sambært nr. 7.7. og 7.8. verður serliga hugt eftir, um tað í innganginum verður víst til lóg ella kunngerð, sum er sett í gildi fyri Føroyar, og hvørjar tillagingar eru gjørdar til føroysk viðurskifti.

Ríkislóggáva er t.d. serstakar fólkatingslógir fyri Føroyar og kongligar fyriskipanir umframt danskar kunngerðir. Hesi uppskot skulu eisini sendast lógartænastuni til eftirkanningar. Donsk lógaruppskot og fyriskipanaruppskot senda stjórnarráðini sum oftast til eftirkanningar, tá ið uppskotið er klárt at senda til landsstýrisfund, soleiðis sum ásett er í rundskrivinum um eftirkanning.

Tá ið talan er um størri lógaruppskot, mælir lógartænastan til, at danska lógaruppskotið ella fyriskipanaruppskotið verður sent lógartænastuni til undaneftirkanning, áðrenn tað verður sent til ummælis. Hetta soleiðis at møguligar tøkniligar villur og tilvísingar til føroyska lóggávu kunnu verða rættaðar av ríkismyndugleikunum, áðrenn uppskotið verður sent út til ummælis.

Danskar kunngerðir (bekendtgørelser) skulu eisini sendast til eftirkanning. Hetta tykjast øll stjórnarráðini ikki at geva sær nóg nógv fær um, tí tað kemur meira enn so fyri, at lógartænastan fyrstu ferð sær danskar kunngerðir, tá tær verða sendar til kunngering í Kunngerðablaðnum.

Vit fara enn einaferð at heita á stjórnarráðini um at minnast til at senda bekendtgørelser, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelser til eftirkanning, tá tey fáa uppskotini til ummælis frá ríkismyndugleikunum.


SERMÁL
Uppskot
lands-stýrið
løgting sam-tykt
løg-maður stað-festa
Kunn-gerða-blaðið
løgtingslóg
JA
MÁL
FELAGS-MÁL
RLT
lands-stýrið
løgting sam-tykt
løg-maður stað-festa
RUB
FT
PK
Mini-sterium
Lov-tiden-de + Kng. blað
Anord-ning
FT-lov
Fólkating

## 3. Tøkniliga eftirkanningin

### 3.1. Ásetingar um tøkniligu eftirkanningina

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 6.1. Tøkniliga eftirkanningin verður gjørd eftir ásetingunum í rundskrivi um lógarsmíð og skal tryggja, at uppskotið uttan trupulleikar ella ivamál kann kunngerast í Kunngerðablaðnum og samanskrivast í logir.fo.
>
> 6.2. Er avvarðandi stjórnarráð og lógartænastan ikki á einum máli um onkra viðmerking, skal stjórnarráðið venda sær til lógartænastuna hesum viðvíkjandi.
>
> 6.3. Uppskot til rundskriv og leiðbeiningar verða einans tøkniliga eftirkannað. Tó so, um okkurt eyðsýnt ivamál er, so verður hetta nevnt.

Lógartænastan eftirkannar uppskot við støði í galdandi rundskrivi um lógarsmíð, sum kom í gildi 1. januar 2018.

Viðvíkjandi tí tøkniliga partinum av eftirkanningini er tað framvegis soleiðis, at onkur av stjórnar-ráðunum ikki geva sær nóg nógv far um, at tað er tað eftirkannaða uppskotið (skjalið), sum skal sendast til Løgtingið ella til kunngering.

### 3.2. Tá broytt verður í einum eftirkannaðum uppskoti

Tað kemur eisini fyri, at stjórnarráðini broyta uppskotið, eftir at tað hevur verið til eftirkanningar, t.d. strika ella seta nýggjar ásetingar inn. Tá hava vit eisini seinni sæð, at broytingin ikki er sett rætt upp tøkniliga. Vit mæla til, at um broytingar verða gjørdar í uppskotinum aftan á eftirkanningina, at stjórnarráðini senda uppskotið til endureftirkanning. Hesi uppskot kann lógartænastan ofta avgreiða skjótt, um stjórnarráðið upplýsir, hvørjar broytingar tey hava gjørt.

### 3.3. Uppskot sum er burturfallið í tinginum og verður sett fram aftur

Uppskot, sum er burturfallið í Løgtinginum, t.d. tí tingsetan endaði, áðrenn uppskotið var liðugt viðgjørt, og sum landsstýrið aftur ætlar at leggja fyri Løgtingið, skal sendast til eftirkanning eins og onnur uppskot, hóast uppskotið hevur verið eftirkannað í eini fyrru tingsetu. Tað vísir seg ofta, at smærri broytingar eru gjørdar, og at tøkniligar villur sníkja seg inn aftur í uppskotið. Hesi uppskot kann lógartænastan ofta avgreiða skjótt, um stjórnarráðið upplýsir, hvørjar broytingar tey hava gjørt.

### 3.4. Skabelónir

Lógartænastan hevur gjørt 8 skabelónir til: uppskot til løgtingslóg, uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg, uppskot til samtyktar, javntekst, uppskot til kunngerð, uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð, uppskot til ríkislógartilmæli, uppskot til rundskriv og uppskot til leiðbeiningar.

Nýggjasta útgávan er altíð at finna á breddanum hjá lógartænastuni á heimasíðuni hjá Løgmálaráðnum: http://www.lms.fo/fo/arbeidsoki/logarsmid/word-skabelonir-til-logarsmid/

Øll sum gera uppskot til løgtingslógir, kunngerðir, uppskot til samtyktar, rundskriv og leiðbeiningar o.a. eiga at brúka skabelónirnar, tí hetta ger, at uppskotini verða sett rætt upp tøkniliga.

# 4. Yvirlit yvir eftirkanningar

## 4.1. Uppskot, ið skulu eftirkannast av lógartænastuni

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 2.1. Lógartænastan í Løgmálaráðnum eftirkannar øll uppskot til løgtingslóg, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.
>
> 2.2. Lógartænastan eftirkannar øll uppskot til kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini allar kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at lýsa kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna.
>
> 2.3. Lógartænastan eftirkannar eisini uppskot til bekendtgørelse, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse, sum ríkismyndugleikarnir senda til ummælis hjá stjórnarráðunum.

Í løgtingsárinum 2022 eftirkannaði lógartænastan tilsamans 216 uppskot frá øllum nýggju stjórnarráðunum. Fyrru setuna eftirkannaði lógartænastan 66 uppskot, seinnu setuna 150 uppskot. Samanumtikið eftirkannaði lógartænastan í 2022 4 uppskot fleiri enn í tingárinum 2021.

Nøgdin av uppskotum sigur tó ikki alt, tí uppskotini kunnu vera sera ymisk bæði í longd, torleika og margfeldið. Soleiðis var eisini í hesum tingárinum.

*Talva 1*

**Eftirkanningar íalt**

| | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Løgtingslóg** | 19 | 11 | 14 | 23 | 29 | 26 | 21 | 28 | 14 |
| **Kunngerð** | 69 | 74 | 97 | 88 | 93 | 76 | 97 | 76 | 55 |
| **Broytingarlóg** | 75 | 64 | 50 | 46 | 72 | 48 | 56 | 42 | 32 |
| **Broytingarkunngerð** | 35 | 36 | 50 | 65 | 54 | 39 | 47 | 54 | 48 |
| **Ríkislógartilmæli** | 27 | 3 | 11 | 12 | 6 | 6 | 8 | 7 | 10 |
| **Uppsk. til samtyktar** | 3 | 1 | - | 1 | 2 | 3 | 1 | 1 | 2 |
| **Stovnar** | | | | 5 | 1 | - | 1 | 1 | |
| **Rundskriv** | | | | 6 | 8 | 2 | 1 | 3 | 5 |
| **Leiðbeining** | | | | 2 | - | 2 | 2 | - | 6 |
| **Bekendtgørelse** | | | | | | | | | 44 |
| **Kirkjulig fyriskipan** | | | | | | 1 | - | - | |
| **Íalt** | 228 | 189 | 222 | 248 | 265 | 202 | 234 | 212 | 216 |

| *Talva 2*<br>**Eftirkanningar íalt**<br>**býtt eftir fyrru og seinnu setu[1]** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2022 (1)** | **2022 (2)** | **2022** |
| **Løgtingslóg** | **2** | **12** | **14** |
| **Kunngerð** | **30** | **25** | **55** |
| **Broytingarlóg** | **5** | **27** | **32** |
| **Broytingarkunngerð** | **20** | **28** | **48** |
| **Ríkislógartilmæli** | **4** | **6** | **10** |
| **Uppsk. til samtyktar** | **-** | **2** | **2** |
| **Stovnar** | **-** | **-** | **-** |
| **Rundskriv** | **1** | **4** | **5** |
| **Leiðbeining** | **3** | **3** | **6** |
| **Bekendtgørelse** | **1** | **43** | **44** |
| **Kirkjulig fyriskipan** | **-** | **-** | **-** |
| **Íalt** | **66** | **150** | **216** |

**4.2. Yvirlit yvir uppskotini**

Tá ið nýggj landsstýri koma til, er tað vanligt, at tað verða gjørdar broytingar í býtinum millum stjórnarráðini. Tað er heldur ikki óvanligt, at stjórnarráð verða løgd saman, og at nýggj stjórnarráð verða sett á stovn. Hesaferð hava broytingarnar tó verið meira umfatandi enn vanligt. Talið á stjórnarráðum er farið úr 7 upp á 9, og nógvar aðrar týðandi flytingar av málsøkjum hava verið millum stjórnarráðini.

Sum dømi kann nevnast, at útlendingamál og persóns-, familju- og arvamál eru flutt frá ávikavist Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og Almannamálaráðnum til Løgmálaráðið, sum samstundis er eitt heilt nýtt ráð, sí annars yvirlit yvir broytingarnar á s. 4-8.

Hetta ger tað óvanliga trupult at gera skynsamar samanberingar við undanfarin ár. Broytingarnar í stjórnarráðunum, og flytingarnar av málsøkjum, eru heilt einfalt ov nógvar og ov stórar.

Í ársfrágreiðingini fyri í ár hevur lógartænastan tí valt ikki at samanbera við undanfarin løgtingsár, eins og tað vanliga verður gjørt. Talvurnar niðanfyri hava tí bara tøl fyri løgtingsárið 2022, býtt út á fyrru og seinnu setu. Um lesarin sjálvur vil royna at samanbera við undanfarin løgtingsár, ber til at hyggja í gomlu ársfrágreiðingarnar, ið eru at finna á heimasíðuni hjá Løgmálaráðnum.

Niðanfyri er yvirlit yvir uppskotini frá teimum einstøku stjórnarráðunum í løgtingsárinum 2022. Tað er býtt upp í **fyrru setu 2022 (1)**, tá ið tað vóru 7 stjórnarráð, og **seinnu setu 2022 (2)**, tá ið tað vóru 9 stjórnarráð.

[1] Fyrra tingseta (1): 29. juli 2022 til 6. desember 2022. Seinna tingseta (2): 6. desember 2022 til 28. juli 2023.

*Talva 3*

| **Løgmansskrivstovan** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2022 (1)** | **2022 (2)** | **2022** |
| **Løgtingslóg** | **-** | **1** | **1** |
| **Kunngerð** | **-** | **-** | **-** |
| **Broytingarlóg** | **1** | **2** | **3** |
| **Broytingarkunngerð** | **-** | **-** | **-** |
| **Ríkislógartilmæli** | **1** | **-** | **1** |
| **Uppsk. til samtyktar** | **-** | **-** | **-** |
| **Rundskriv** | **-** | **-** | **-** |
| **Kirkjulig fyriskipan** | **-** | **-** | **-** |
| **Íalt** | **2** | **3** | **5** |

*Talva 4*

| **Fíggjarmálaráðið** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2022 (1)** | **2022 (2)** | **2022** |
| **Løgtingslóg** | **-** | **4** | **4** |
| **Kunngerð** | **3** | **3** | **6** |
| **Broytingarlóg** | **3** | **9** | **12** |
| **Broytingarkunngerð** | **-** | **4** | **4** |
| **Ríkislógartilmæli** | **-** | **-** | **-** |
| **Uppsk. til samtyktar** | **-** | **-** | **-** |
| **Rundskriv** | **1** | **1** | **2** |
| **Leiðbeining** | **-** | **-** | **-** |
| **Íalt** | **7** | **21** | **28** |

| *Talva 5*<br>**Umhvørvis- og vinnumálaráðið** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2022 (1)** | **2022 (2)*** | **2022** |
| **Løgtingslóg** | **1** | **-** | **1** |
| **Kunngerð** | **3** | | **3** |
| **Broytingarlóg** | **3** | **-** | **3** |
| **Broytingarkunngerð** | **1** | **-** | **1** |
| **Ríkislógartilmæli** | **2** | **-** | **2** |
| **Uppsk. til samtyktar** | **-** | **-** | **-** |
| **Rundskriv** | **-** | **-** | **-** |
| **Leiðbeining** | **-** | **-** | **-** |
| **Stovnar*** ** | **-** | **-** | **-** |
| **Íalt** | **10** | **-** | **10** |

** Sí talvu 11, Umhvørvismálaráðið.*

| *Talva 6*<br>**Fiskimálaráðið** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2022 (1)** | **2022 (2)*** | **2022** |
| **Løgtingslóg** | **-** | **-** | **-** |
| **Kunngerð** | **14** | **-** | **14** |
| **Broytingarlóg** | **1** | **-** | **1** |
| **Broytingarkunngerð** | **6** | **-** | **6** |
| **Ríkislógartilmæli** | **-** | **-** | **-** |
| **Uppsk. til samtyktar** | **-** | **-** | **-** |
| **Leiðbeining** | **-** | **-** | **-** |
| **Íalt** | **21** | **-** | **21** |

**Sí talvu 14, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið.*

| *Talva 7*<br>**Uttanríkis- og mentamálaráðið** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2022 (1)** | **2022 (2)*** | **2022** |
| **Løgtingslóg** | **-** | **-** | **-** |
| **Kunngerð** | **3** | **-** | **3** |
| **Broytingarlóg** | **-** | **-** | **-** |
| **Broytingarkunngerð** | **1** | **-** | **1** |
| **Ríkislógartilmæli** | **-** | **-** | **-** |
| **Uppsk. til samtyktar** | **-** | **-** | **-** |
| **Rundskriv** | **-** | **-** | **-** |
| **Bekendtgørelse** | **-** | **-** | **-** |
| **Íalt** | **4** | **-** | **4** |

**Sí talvu 12, Uttanríkis- og vinnumálaráðið*

| *Talva 8*<br>**Heilsumálaráðið** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2022 (1)** | **2022 (2)** | **2022** |
| **Løgtingslóg** | **-** | **1** | **1** |
| **Kunngerð** | **3** | **2** | **5** |
| **Broytingarlóg** | **-** | **1** | **1** |
| **Broytingarkunngerð** | **8** | **1** | **9** |
| **Ríkislógartilmæli** | **1** | **3** | **4** |
| **Uppsk. til samtyktar** | **-** | **-** | **-** |
| **Leiðbeining** | **-** | **1** | **1** |
| **Íalt** | **12** | **9** | **21** |

| *Talva 9*<br>**Almannamálaráðið** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2022 (1)** | **2022 (2)*** | **2022** |
| **Løgtingslóg** | **-** | **-** | **-** |
| **Kunngerð** | **3** | **-** | **-** |
| **Broytingarlóg** | **1** | **-** | **-** |
| **Broytingarkunngerð** | **4** | **-** | **-** |
| **Ríkislógartilmæli** | **-** | **-** | **-** |
| **Uppsk. til samtyktar** | **-** | **-** | **-** |
| **Leiðbeining** | **2** | **-** | **-** |
| **Íalt** | **10** | **-** | **10** |

**Sí talvu 15, Almanna- og mentamálaráðið.*

| *Talva 10*<br>**Løgmálaráðið** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2022 (1)** | **2022 (2)** | **2022** |
| **Løgtingslóg** | **-** | **1** | **1** |
| **Kunngerð** | **-** | **1** | **1** |
| **Broytingarlóg** | **-** | **-** | **-** |
| **Broytingarkunngerð** | **-** | **2** | **2** |
| **Ríkislógartilmæli** | **-** | **1** | **1** |
| **Uppsk. til samtyktar** | **-** | **-** | **-** |
| **Rundskriv** | **-** | **1** | **1** |
| **Leiðbeining** | **-** | **1** | **1** |
| **Bekendtgørelse** | **-** | **39** | **39** |
| **Kirkjulig fyriskipan** | **-** | **-** | **-** |
| **Íalt** | **-** | **46** | **46** |

‘

| *Talva 11* Umhvørvismálaráðið | | | |
|---|---|---|---|
| | 2022 (1)* | 2022 (2) | 2022 |
| Løgtingslóg | - | 1 | 1 |
| Kunngerð | - | - | - |
| Broytingarlóg | - | 4 | 4 |
| Broytingarkunngerð | - | - | - |
| Ríkislógartilmæli | - | - | - |
| Uppsk. til samtyktar | - | - | - |
| Rundskriv | - | - | - |
| Leiðbeining | - | - | - |
| Bekendtgørelse | - | - | - |
| Kirkjulig fyriskipan | - | - | - |
| Íalt | - | 5 | 5 |

** Sí talvu 5, Umhvørvis- og vinnumálaráðið*

| *Talva 12* Uttanríkis- og vinnumálaráðið | | | |
|---|---|---|---|
| | 2022 (1) * | 2022 (2) | 2022 |
| Løgtingslóg | - | 2 | 2 |
| Kunngerð | - | 3 | 3 |
| Broytingarlóg | - | 4 | 4 |
| Broytingarkunngerð | - | 6 | 6 |
| Ríkislógartilmæli | - | 2 | 2 |
| Uppsk. til samtyktar | - | 2 | 2 |
| Rundskriv | - | - | - |
| Leiðbeining | - | - | - |
| Bekendtgørelse | - | 4 | 4 |
| Kirkjulig fyriskipan | - | - | - |
| Íalt | - | 23 | 23 |

**Sí talvu 7, Uttanríkis- og mentaumálaráðið*

| *Talva 13* Barna- og útbúgvingarmálaráðið | | | |
|---|---|---|---|
| | 2022 (1) | 2022 (2) | 2022 |
| Løgtingslóg | - | 2 | 2 |
| Kunngerð | - | 6 | 6 |
| Broytingarlóg | - | 2 | 2 |
| Broytingarkunngerð | - | 1 | 1 |
| Ríkislógartilmæli | - | - | - |
| Uppsk. til samtyktar | - | - | - |
| Rundskriv | - | 1 | 1 |
| Leiðbeining | - | 1 | 1 |
| Kirkjulig fyriskipan | - | - | - |
| Íalt | - | 13 | 13 |

| *Talva 14* Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið | | | |
|---|---|---|---|
| | 2022 (1)* | 2022 (2) | 2022 |
| Løgtingslóg | - | - | - |
| Kunngerð | - | 9 | 9 |
| Broytingarlóg | - | - | - |
| Broytingarkunngerð | - | 8 | 8 |
| Ríkislógartilmæli | - | - | - |
| Uppsk. til samtyktar | - | - | - |
| Rundskriv | - | - | - |
| Leiðbeining | - | - | - |
| Bekendtgørelse | - | - | - |
| Kirkjulig fyriskipan | - | - | - |
| Íalt | - | 17 | 17 |

**Sí talvu 6, Fiskimálaráðið*

| *Talva 15*<br>**Almanna- og mentamálaráðið** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2022 (1)*** | **2022 (2)** | **2022** |
| **Løgtingslóg** | **-** | **2** | **2** |
| **Kunngerð** | **-** | **3** | **3** |
| **Broytingarlóg** | **-** | **2** | **2** |
| **Broytingarkunngerð** | **-** | **7** | **7** |
| **Ríkislógartilmæli** | **-** | **-** | **-** |
| **Uppsk. til samtyktar** | **-** | **-** | **-** |
| **Leiðbeining** | **-** | **-** | **-** |
| **Íalt** | **-** | **14** | **14** |

**Sí talvu 9, Almannamálaráðið.*

### 4.3. Hvat siga tølini?

*Mynd 1*




*Mynd 2*



Lógartænastan hevur í løgtingsárinum 2022 eftirkannað tilsamans 216 uppskot, t.e. 4 uppskot fleiri enn í løgtingsárinum 2021. Her er tó neyðugt at viðmerkja, at millum eftirkanningarnar í 2022 vóru óvanliga nógvar danskar kunngerðir (44), sum telja 20% av øllum eftirkanningunum. 39 av hesum vóru kunngerðir til nýggju revsifulnaðarlógina fyri Føroyar, sum kom í gildi tann 1. juli 2023.

Um tað bara verður hugt eftir uppskotum til løgtingslógir, broytingarlógir, kunngerðir og broytingarkunngerðir, sum tað er meira rættvísandi at samanbera við, sæst, at lógartænastan hevur eftirkannað 26% færri uppskot í 2022 enn í 2021. Høvuðsorsøkin er helst hon, at 2022 var eitt valár, tí tann sama myndin ger seg galdandi fyri valárini 2015 og 2019, tá tað eisini vóru munandi færri eftirkanningar enn vanligt. Hetta bendir á, at tá eitt landsstýri hevur 3-4 ár á baki, hevur tað avgreitt tey flestu av sínum politisku málum, og tí minkar lógar- og kunngerðarframleiðslan í landsstýrinum.

Um hugt verður eftir, hvussu tølini býta seg millum fyrru setuna og seinnu setuna, sæst, at fyrru setuna vóru 66 eftirkanningar, meðan tað seinnu setuna vóru 150 eftirkanningar (111, um tað verður hugt burtur frá teimum 39 donsku kunngerðunum, sum høvdu samband við revsifulnaðarlógina). Hetta stuðlar eisini undir frágreiðingina omanfyri.

Flestu uppskotini fyrru setuna hevði Fiskimálaráðið við 21 uppskotum. Hini uppskotini vóru býtt millum Heilsumálaráðið 12, Umhvørvis- og vinnumálaráðið 10, Almannamálaráðið 10, Fíggjarmálaráðið 7, Uttanríkis- og mentamálaráðið 4 og Løgmansskrivstovuna 2.

Seinnu setuna hevði Løgmálaráðið tey flestu uppskotini (46), men nógv tann størsti parturin av uppskotunum vóru tær 39 donsku kunngerðirnar á revsifulnaðarøkinum. Um hugt verður burtur frá hesum kunngerðunum, vóru tað Uttanríkis- og vinnumálaráðið 23 og Fíggjarmálaráðið 21, ið høvdu flest uppskot. Hini uppskotini vóru býtt millum Fiskimálaráðið 17, Almanna- og mentamálaráðið 14, Barna- og útbúgvingarmálaráðið 13, Heilsumálaráðið 9, Umhvørvismálaráðið 5, Løgmansskrivstovuna 3, meðan Løgmálaráðið hevði 7 uppskot aftrat teimum 39 donsku kunngerðunum.

Flestu uppskot, sum lógartænastan eftirkannar, eru kunngerðaruppskot, og soleiðis hevur eisini verið í ár. Um tað enn einaferð verður hugt burtur frá teimum 39 donsku kunngerðunum á revsifulnaðarøkinum, sæst, at 58% av uppskotunum, sum lógartænastan eftirkannaði í 2022, vóru kunngerðaruppskot. Hetta er á leið sama lutfall sum í 2021 (61%). Annars er at viðmerkja, at hóast tað samanlagt hava verið færri uppskot í ár, hava tað verið lutfalsliga líka nógvar nýggjar kunngerðir og broytingarlógir í 2022 sum í 2021, meðan talið á broytingarkunngerðum hevur verið lutfalsliga stórt í ár.

Merkisvert er, at tað bara hava verið 14 nýggjar løgtingslógir í 2022[2]. Í mun til 2021 (28) er talið á nýggjum løgtingslógum sostatt farið niður í helvt, og tað hava ikki verið so fáar nýggjar løgtingslógir síðani løgtingsárið 2014. Av teimum 14 uppskotunum til nýggja løgtingslóg komu tey flestu frá Fíggjarmálaráðnum (4).

---

[2] Ein nýggj løgtingslóg merkir, at tað verður lóggivið um nakað, sum tað ikki fyrr er lóggivið um, ella at lóggávan á økinum verður endurnýggjað og umskipað soleiðis, at tað ikki er nøktandi at gera broytingar í einari galdandi løgtingslóg.

*Mynd 3*



Gongdin í slagi av rættarreglum 2014 - 2022
120
100
80
60
40
20
0
2014
2015
2016
2017
2018
2019
2020
2021
2022
Løgtingslóg
Kunngerð
Broytingarlóg
Broytingarkunngerð
Ríkislógartilmæli
Annað

*Mynd 4*




Tað sæst týðuliga, at tað serliga eru kunngerðirnar, sum tað eru flest av í eftirkanningini. Av teimum 216 uppskotunum vóru 103 kunngerðir, 55 nýggjar kunngerðir og 48 broytingarkunngerðir. T.v.s. at 48% av eftirkanningunum í tingárinum 2022 vóru kunngerðir.

Afturímóti vóru 46 lógaruppskot, av hesum 14 nýggjar lógir og 32 broytingarlógir; hetta svarar til 21% av eftirkannaðu uppskotunum. Ríkislógartilmælini vóru 10 í tali svarandi til 5%. Bekendtgørelser vóru 44 í tali svarandi til 20%. 39 av hesum vóru kunngerðir til nýggju revsifulnaðarlógina fyri Føroyar, sum kom í gildi tann 1. juli 2023. Seinastu 6% eru uppskot til samtyktar, rundskriv og leiðbeiningar.

### 4.4. Longd á eftirkanning

Rundskrivið um eftirkanning ásetir:

> 3.2. Lógartænastan skal hava í minsta lagi 5 yrkadagar til eftirkanning. Í serligum førum, tá arbeiðsbyrðan hjá lógartænastuni kann væntast at vera stór, t.d. undan seinasta framløgudegi, kann roknast við, at eftirkanning tekur longri enn 5 yrkadagar. Hetta eigur landsfyrisitingin at hava í huga.

Í løgtingsárinum 2022 vórðu umleið 95% av uppskotunum eftirkannað innan fyri 5 yrkadagar, sum lógartænastan vanliga skal hava til at eftirkanna eitt uppskot. Saman við løgtingsárinum 2021 er talan um besta úrslit tey 9 árini, har eftirkanningarnar eru skrásettar.

Umleið 99% av uppskotunum í 2022 vórðu eftirkannað innan 8 yrkadagar. Bara í trimum førum (1,4%) hevur eftirkanningin tikið 9 dagar ella longri.

*Talva 16*

**Longd á eftirkanning**

| | 1-5 dagar | | 6-8 dagar | | 9 dagar ella longri | | Íalt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tal | % | Tal | % | Tal | % | |
| **2014** | 178 | 77,7 | 32 | 14,0 | 19 | 8,3 | **229** |
| **2015** | 171 | 89,5 | 5 | 2,6 | 15 | 7,9 | **191** |
| **2016** | 170 | 76,6 | 20 | 9,0 | 32 | 14,4 | **222** |
| **2017** | 206 | 83% | 22 | 9% | 20 | 8% | **248** |
| **2018** | 234 | 89% | 20 | 7% | 11 | 4% | **265** |
| **2019** | 185 | 92% | 9 | 4% | 8 | 4% | **202** |
| **2020** | 220 | 93% | 15 | 6% | 1 | 1% | **234** |
| **2021** | 201 | 95% | 9 | 4% | 2 | 1% | **212** |
| **2022** | 205 | 94,9 | 8 | 3,7 | 3 | 1,4 | **216** |

## Longd á eftirkanning 2014 – 2022

*Mynd 5*



Tað sæst, at øll árini síðani 2014 vísir myndin eitt støðugt úrslit viðvíkjandi eftirkanningunum, har millum 76% og 95% av uppskotunum eru eftirkannaði innan 5 dagar, sum er freistin sum lógartænastan skal hava til at eftirkanna uppskot. Eisini er tað gott, at tað seinastu árini einans eru nøkur heilt fá uppskot, har eftirkanningin hevur tikið 9 dagar ella longri.

## 5. Eftirkannað uppskot og viðgerðin í Løgtinginum

Lógartænastan hevur í løgtingsárinum 2022 eftirkannað 14 uppskot til høvuðslógir, 32 uppskot til broytingarlógir, 10 uppskot til ríkislógartilmæli og 2 uppskot til samtyktar. Hetta er tilsamans 58 uppskot.

Landsstýrið hevur í løgtingsárinum 2022 lagt 57 uppskot fyri Løgtingið, 45 lógaruppskot, 10 ríkislógartilmæli og 2 uppskot til samtyktar. Av teimum 45 lógaruppskotunum vóru 12 uppskot til nýggjar løgtingslógir og 33 uppskot til broytingarlógir.

Løgtingið samtykti øll 12 uppskotini til nýggjar løgtingslógir, meðan 22 av teimum 33 uppskotunum til broytingarlógir vórðu samtykt. Tilsamans samtykti Løgtingið 34 av teimum 45 lógaruppskotunum hjá landsstýrinum, t.e. 76 %.

Løgtingið samtykti harafturat 8 av teimum 10 ríkislógartilmælunum, t.e. 80 %, og bæði uppskotini til samtyktar.

Samanumtikið samtykti Løgtingið 44 av 57 uppskotum hjá landsstýrinum, t.e. 77%. 13 uppskot fullu burtur, t.e. 23%.

At tað ikki er samsvar millum talið á eftirkannaðum uppskotum og tal á uppskotum, ið vóru løgd fram í tinginum, kann koma av, at eitt eftirkannað uppskot ikki er lagt fyri Løgtingið. Tað kemur tó eisini fyri, at sama uppskot verður broytt aftan á eftirkanningina, verður sent til eftirkanningar umaftur, og at uppskotið tískil er eftirkannað meira enn eina ferð. Heldur ikki kann útihýsast, at okkurt uppskot er eftirkannað, men ikki er skrásett í yvirlitinum hjá lógartænastuni.

*Mynd 6*



Í **fyrru setu** í 2022 legði undanfarna landsstýri 15 uppskot fyri Løgtingið, 13 lógaruppskot og 2 ríkislógartilmæli. 3 út av 13 lógaruppskotum vórðu samtykt. Av 2 ríkislógartilmælum varð einki samtykt. Sostatt vóru í alt 12 uppskot, ið fullu burtur í fyrru setu í 2022.

*Mynd 7*




Í **seinnu setu** í 2022 vóru í alt 42 uppskot. 31 av 32 lógaruppskotum vórðu samtykt. Av 8 ríkislógartilmælum vórðu øll samtykt. Av 2 uppskotum til samtyktar vórðu bæði samtykt. Sostatt var einans 1 uppskot, ið fall burtur í seinnu setu í 2022.

*Mynd 8*



*Mynd 9*



Úrslitið í Løgtinginum í 2017, 2018, 2019, 2020, 2021 og 2022
100
90
80
70
60
50
40
30
20
10
0
2017
2018
2019
2020
2021
2022
Framlagt
Samtykt
Burturfallið
Tikið aftur

## 6. Ummælisportalurin

Uppskot eiga altíð at verða send til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, og vanliga eigur tíðarfreistin at lata inn ummæli at vera 4 vikur. Henda freist eigur ikki at verða skerd, uttan so at tað er átrokandi neyðugt.

Eftir áheitan frá MEGD verður mælt til, at stjórnarráðini í størst møguligan mun eisini senda uppskot til ummælis hjá MEGD.

Uppskot til verklagslógir eiga altíð at verða send til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum.

*Umframt* at stjórnarráðini senda uppskot til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, skulu øll uppskot hjá stjórnarráðunum eisini leggjast á ummælisportalin á heimasíðuni hjá landsstýrinum, sum øll hava atgongd til.

Ummælisportalurin er at finna á hesum leinki: [http://www.foroyalandsstyri.fo/fo/kunning/uppskot-til-ummaelis/](http://www.foroyalandsstyri.fo/fo/kunning/uppskot-til-ummaelis/)

Á heimasíðunum hjá stjórnarráðunum ber eisini til einans at síggja tey uppskot, sum viðkomandi ráðið hevur til ummælis.

Okkara royndir eru, at stjórnarráðini nú eru meira tilvitað um at leggja fyrireikingararbeiðið við lógaruppskotum soleiðis til rættis, at tað í tíðarætlanini eisini verður sett tíð til, at uppskot kunnu verða send til ummælis sum høvuðsregla í 4 vikur.

Enn er tað tó soleiðis, at orsakað av tíðarneyð verður ummælistíðin ofta skerd, heilt niður í nakrar dagar, og í hesum førunum verða uppskotini ofta heldur ikki løgd út á almenna ummælisportalin. Hetta hevur við sær, at dygdin á lógaruppskotinum ikki gerst so góð, sum hon kundi verið.

### 6.1. Einans uppskot sum eru løgd á ummælisportalin

Grundarlagið fyri hesum partinum av ársfrágreiðingini er ein uppteljing av teimum uppskotum, sum hava verið løgd út alment til ummælis á ummælisportalinum á heimasíðuni hjá landsstýrinum. Tað merkir, at uppskot, sum als ikki hava verið send til ummælis, ella sum einans hava verið send beinleiðis til ummælis hjá viðkomandi uttanhýsis pørtum, ikki eru við í hesi uppteljing. Yvirlitið vísir sostatt einans ummælisfreistir fyri tey uppskot, sum hava verið á ummælisportalinum.

### 6.2. Ummælisfreistir

Løgtingsárið 2022 vórðu 136 uppskot løgd alment til ummælis á ummælisportalinum. Teirra millum vóru 33 lógaruppskot, 39 kunngerðir, 39 danskar kunngerðir 6 ríkislógartilmæli og 1 uppskot til samtyktar. 33 uppskot vóru í fyrru setu og 103 uppskot í seinnu setu.

| *Talva 17*<br>**Ummælisfreistir** | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2020** | | **2021** | | **2022 (1)** | | **2022 (2)** | | **2022** | |
| | **Nøgd** | **%** | **Nøgd** | **%** | **Nøgd** | **%** | **Nøgd** | **%** | **Nøgd** | **%** |
| **1 - 14 dagar** | 30 | 30% | 27 | 34% | 5 | 15% | 16 | 15,5% | 21 | 15% |
| **15 - 27 dagar** | 35 | 36% | 27 | 34% | 7 | 21% | 10 | 9,5% | 17 | 13% |
| **28 dagar ella longri** | 33 | 34% | 25 | 32% | 21 | 64% | 77 | 75% | 98 | 72% |
| **Íalt** | **98** | **100%** | **79** | **100%** | **33** | **100%** | **103** | **100%** | **136** | **100%** |

Sambært rundskrivinum um lógarsmíð eiga øll uppskot hjá landsstýrinum at verða send til ummælis í minst 4 vikur (ella 28 dagar). Á talvuni omanfyri sæst, at fyri 72% av uppskotunum var ummælisfreistin í løgtingsárinum 4 vikur ella longri.

Hetta er ein stór framgongd í mun til løgtingsárið 2021, tá tað bara vóru 32% av uppskotunum, sum høvdu eina ummælisfreist upp á 4 vikur ella longri.

Ein ummælisfreist, styttri enn 14 dagar, verður als ikki mett at vera nøktandi. Ein ummælisfreist upp á í minsta lagi 15 dagar má roknast sum eitt *minstamark* fyri eini rímiligari ummælisfreist. Á talvuni omanfyri sæst, at fyri 15% av uppskotunum var ummælisfreistin sett millum 1-14 dagar, og fyri 85% av uppskotunum var ummælisfreistin 15 dagar ella longri.

Samanumtikið hevur talan sostatt verið um eina stóra framgongd í mun til løgtingsárið 2021 og onnur undanfarin ár, og hetta er sjálvsagt at fegnast um.

*Mynd 10*




Stabbamyndin omanfyri vísir greitt, hvussu stór framgongdin hevur verið í løgtingsárinum 2022 í mun til undanfarin ár. Løgtingsárini 2018-2021 hava tað í miðal bara verið 31,25% av uppskotunum á ummælisportalinum, sum hava havt eina ummælisfreist upp á 4 vikur ella longri. Í ár hava 72% av uppskotunum á ummælisportalinum havt eina ummælisfreist upp á 4 vikur ella longri.

Tað kunnu annars vera fleiri orsakir til, at uppskot vera send til ummælis við eini ummælisfreist, ið er styttri 4 vikur, t.d. tá ið talan er um skunduppskot, skattainntriv o.tíl.

### 6.3. Samanumtøka um ummælisfreistir

Tilsamans vóru 15% av uppskotunum hjá øllum stjórnarráðunum undir einum send til ummælis við styttri enn 14 daga freist, og sum nevnt frammanfyri er *ein ummælisfreist, sum er minni enn 14 dagar, ikki nøktandi*. Hetta er tó ein jalig gongd, tí løgtingsárið 2021 vóru tilsamans 34% av uppskotunum hjá øllum stjórnarráðunum  send til ummælis við styttri enn 14 daga freist.

Samstundis vóru 72% av uppskotunum send til ummælis í 4 vikur ella longri. Hetta er ein stór framgongd í mun til undanfarin ár, og harafturat vóru heili 85 % av uppskotunum send til ummælis við ein ummælisfreist sum var 15 dagar ella longri.

Hetta má sigast at vera ein sera jalig gongd.

### 6.4. Ov nógv uppskot verða ikki løgd á ummælisportalin

Sambært rundskrivinum um lógarsmíð skulu uppskot hjá landsstýrinum ikki bara sendast til ummælis hjá viðkomandi ummælispørtum; tey skulu eisini leggjast alment til ummælis á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri.

Løgtingsárið 2022 vórðu 136 uppskot løgd alment til ummælis á ummælisportalinum. Sama tíðarskeið hevur lógartænastan eftirkannað 216 uppskot. Hetta merkir, at í 2022 hava 63% av uppskotunum hjá landsstýrinum verið alment til ummælis á ummælisportalinum. Um hugt verður burtur frá teimum donsku 39 kunngerðunum á revsifulnaðarøkinum, sum vórðu lagdar út á ummælisportalin í einum, er talið 55%.

Hóast tað framvegis er langt eftir á mál, er talan um eina stóra framgongd í mun til løgtingsárið 2021, tá bara 32% av uppskotunum vóru til ummælis á ummælisportalinum.

Tað kann eisini stutt endurtakast, at hóast eitt uppskot ikki hevur ligið alment til ummælis á ummælisportalinum, merkir tað ikki, at uppskotið als ikki hevur verið til ummælis. Nógv tey flestu av uppskotunum hjá landsstýrinum verða send beinleiðis til ummælis hjá viðkomandi pørtum.

*Mynd 10. Fyrra seta 2022:*




Grái stabbin vísir talið á uppskotum hjá stjórnarráðunum, sum ikki vóru løgd á ummælisportalin.

Fyrru setuna hevði Løgmansskrivstovan 2 uppskot, bæði vóru løgd út á ummælisportalinum. Hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum vóru 8 av 10 uppskotum løgd út á ummælisportalin, hjá Fiskimálaráðnum 2 av 21, hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum 9 av 14, hjá Almannamálaráðnum 5 av 10 og hjá Heilsumálaráðnum 7 av 12. Fíggjarmálaráðið hevði 7 uppskot, einki av hesum varð lagt út á ummælisportalin.

*Mynd 11. Seinna seta 2022:*




Seinnu setuna hevði Løgmansskrivstovan 3 uppskot, øll vóru løgd út á ummælisportalin. Øll 46 uppskotini hjá Løgmálaráðnum vóru somuleiðis løgd út á ummælisportalin. Hjá Fíggjarmálaráðnum vóru 7 av 21 uppskotum løgd út á ummælisportalin, hjá Umhvørvismálaráðnum 8 av 11, hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum 6 av 17, hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum 12 av 23, hjá Almanna- og mentamálaráðnum 5 av 14, hjá Heilsumálaráðnum 14 av 19 og hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum 5 av 13.

Lógartænastan fer at heita á stjórnarráðini um at minnast til, at øll uppskot hjá stjórnarráðunum eisini skulu leggjast á ummælisportalin, umframt at stjórnarráðini senda uppskot beinleiðis til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum.

## 7. Kunngerðablaðið

Í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um alment kunngerðablað, sum broytt við løgtingslóg nr. 131 frá 14. desember 2012, verður álagt landsstýrinum at stíla fyri útgávu av einum almennum kunngerðablaði: Kunngerðablaðið.

Í Kunngerðablaðnum skulu allar løgtingslógir, kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur, ið landsstýrið gevur út, kunngerast.

Síðani 1. januar 2013 hevur Kunngerðablaðið einans verið givið út talgilt og ikki í pappírsútgávu sum áður. Kunngerðaportalurin gerst við hesum einasti bindandi kunngerðamiðilin til løgtingslógir, kunngerðir o.a.

Í Kunngerðablaðið A verða løgtingslógir og kunngerðir, givnar av landsstýrinum, kunngjørdar, og í Kunngerðablaðið B verða lógir og kunngerðir, ið ríkismyndugleikarnir geva út, kunngjørdar.

Tað er lógartænastan, sum hevur ábyrgd fyri at geva út Kunngerðablaðið. Kunngerðablaðið verður vanliga givið út fríggjadagar.

### 7.1. Kunngering í tingárinum 2022

Í tingárinum 2022 vóru tilsamans 216 løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógir og bekendtgørelser o.a. kunngjørd í Kunngerðablaðnum. Av hesum vóru 155 føroyskar rættarreglur og 61 ríkislóggáva. T.v.s. at 71,8% av kunngjørdu rættarreglunum í tingárinum 2022 eru føroyskar, meðan 28,2% er donsk ríkislóggáva.

| *Talva 17* | **Kunngerðir** | **Løgtingslógir** | **Lov og fyriskipan (Anordning)** | **Bekendtgørelse** | **Fíggjarlóg o.a.** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Almannamálaráðið** | 4 | 1 | - | - | - |
| **Almanna- og mentamálaráðið** | 3 | 4 | - | - | - |
| **Barna- og útbúgvingar-málaráðið** | 11 | 3 | - | - | - |
| **Fíggjarmálaráðið** | 7 | 11 | - | - | 13 |
| **Fiskimálaráðið** | 26 | - | - | - | - |
| **Fiskuvinnu- og samferðslu-málaráðið** | 14 | - | - | - | - |
| **Heilsumálaráðið** | 11 | 3 | 2 | 1 | - |
| **Løgmálaráðið** | 1 | 2 | 4 | 39 | |
| **Løgmansskrivstovan** | 2 | 3 | - | 4 | - |
| **Umhvørvismálaráðið** | - | 3 | - | - | - |
| **Umhvørvis- og vinnumálaráðið** | 7 | - | - | 3 | - |
| **Uttanríkis- og mentamálaráðið** | 4 | 1 | - | - | - |
| **Uttanríkis- og vinnumálaráðið** | 10 | 6 | 3 | 5 | 5 |
| **Íalt** | **100** | **37** | **9** | **52** | **18** |

*Mynd 12*




*Mynd 13*

